**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1016**
**Tíðarskeið 13/05-18/05-2010**

---

**Fólk frá Havstovuni.:** Bogi Hansen 13-16/5 og Regin Kristiansen.
Karin M. H. Larsen. 16-17/5
Francisca Staines-Urias (Botnprøvar).

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum. Vit skuldu eisini taka fortoyningar upp á teimum føstu støðunum og leggja eina út. Eisini skuldu vit taka nakrar botnprøvar

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2-glúpur og útgerð at taka fortoyningar upp við.
Ein mátari, sum skuldi leggjast út í Bankarennuni. Eitt tól at taka botnprøvar við (CORE).

**Um túrin:** Vit fóru út hóskvøldið 13/5 kl.2300. Vit sigldu norður til NWNA, har vit byrjaðu at taka mátara upp, vit tóku so allar hinar mátararnar upp eisini, NWNE, NWNB og NWNG, alt gekk uttan trupulleikar. Tá liðugt var norðanfyri, sigldu vit inn móti kantinum, uml. 500 m dýpi og tóku botnprøvar, men vit fingu einki upp, helst tí at tað var sandbotnur.
Vit sigldu so suður á skurð V, sum vit tóku frá Trøllhøvda og vestur um Føroyabanka. Frá støð V19 fóru vit inn í Bankarennuna at taka mátara upp, fyrst tóku vit NWFC upp, og løgdu so ein nýggjan mátara NWFH, sum meiningin er at lesa av accoustiskt. So tóku vit NWFB upp, har fingu vit onki samband, men hon kom til vatnskorpuna sum vanligt.
Siglt varð nú á Havnina við Boga Hansen og Karin M.H.Larsen kom umborð.
Síðani tóku vit skurð E eystureftir. Á skurðinum tóku vit eisini botnprøvar í sunnara kanti á Sandoyarbanka.
Tá skurðurin var liðugur sigldu vit suður á skurð S, sum vit tóku móti Munkagrunninum. Á vegnum tóku vit mátararnar NWSC, NWSY og NWSX upp, hetta gekk alt væl.
Á veg norðureftir tóku vit eisini botnprøvar í eystara kanti av Munkagrunninum.
Tá hetta var liðugt, varð siglt á Havnina.
Vit vóru aftur á Havnini mánadagin 17/5 kl. 2330.

**Prøvataking:** Við Seabird-CTDini tóku vit 35 støðir og saltprøvar á øllum. Við WP2-glúpinum tóku vit 35 støðir. Botnprøvar.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða lisnir í heyst.

**Viðmerkingar:** Skurður N varð ikki tikin, tí hann varð tikin á túri 1014 beint frammanundan.

08-06-2010 ________________________
Regin Kristiansen

Vend




Støðir og kósir á túri 1016